Kyndil-KÍF 24-24 (11-11):

Kyndil bjargaði javnleikinum

Seinastu fimm minuttirnar av dystinum móti KÍF vann Kyndil eina fýra mála stóra leiðslu aftur, og bjargaðu teir sostatt eitt stig burtur úr annars vónleysari støðu

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tey flestu mundu rokna við einum spennandi dysti, tá KÍF vitjaði Kyndil mikukvøldið. Síðani nýggju leikararnir hjá KÍF komu á liðið - for restin júst móti Kyndli – hevur kurvan hjá liðnum peiggjað beint uppeftir, og tó at úrtøkan ikki hevur verið full hvørja ferð, so hevur liðið í øllum førum sýnt, at teir nú kunnu taka dystin upp móti sterkastu liðunum í landinum.

Høvdu takið

Mikukvøldið sýndu kollfirðingarnir eisini heilt leingi, at her skuldi Kyndil ikki rokna við nøkrum sum helst. Fyri steðgin gekk ógvuliga javnt á. Liðini bæði skiftust um at hava leiðsluna, og yvirhøvur tóktist talan vera um ein sera tungan dyst, har báðir partar royndu at spenna seg heilt út.

Sum frá leið, so tóktist tað tó so, at kollfirðingarnir skaptu sær eina lítla yvirvág. Fyri steðgin kom hetta tó ikk til sjóndar á málatlvuni, men beinan vegin eftir steðgin kom munur í. Kollfirðingar stóðu seg hesa løtuna sera væl í verjupartinum, og í álopspartinum var avrikið so avgjørt millum tey bestu frá teirra síðu í ár. Roynt varð alla tíðina at leggja trýst á verjuna, og hugsaði Kyndil ov nógv um skothóttanina frá bakkinum, stóðu vengurnir alla tíðina til reiðar, soleiðis at eisini teir komu nakrar ferðirnar á talvuna.

Mistu í evstu løtu

Sum hálvleikurin leið, so sá støðan hjá heimaliðnum alt meira vónleys út. Kollfirðingar hildu alla tíðina eitt rimmar fast tak um dystin, og bert fimm minuttir fyri leiklok vóru framvegis fýra mál á muni. Ein støða, sum undir vanligum umstøðum átti at borið sigur við sær.

Men taðð gjørdi hon tó ikki. Kyndil gjørdi í eini seinastu roynd at venda dystin av, at mansverja báðar teir útlendsku leikararnar hjá KÍF, og tó at plássið at spæla soleiðis skuldi verið munandi betri hjá hinum fýra, so setti hetta av álvara kílar í hjá KÍF. Seinastu tríggjar minuttir skeyt Kyndil trý mál á rað, og tó at teir helst høvdu ætlað sær sigurin, so mundi tað kennast sum ein stórur lætti, at teir hóast alt fingu nakað burturúr.



KÍF hevði mest sum alla tíðina takið á Jacob Jónsson og Kyndli, men í seinastu minuttunum fingu teir grønu kortini bjargað øðrum stiginum

Mynd: Álvur Haraldsen

Sum so kann eisini væl vera, at javnleikurin í veruleikanum gav báðum liðunum eins nógv, sum ein sigur vildi gjørt. Hvørki teirra hevur í løtuni nakran annan javnleik á kontini, og tá stigini verða hálverað um ársskiftið verður jú altíð rundað uppeftir.

Men hóast teimum sostatt ikki nýtist at missa nakað við hesum, so er einki at taka seg aftur í, at kollfirðingar iðraðu seg eftir dystin. Teir høvdu í seinna hálvleiki øll essini á hondini, men trumfarnir vórðu helst spældir ov tíðliga út. Spurningurin er so, hvørt hetta er nakað, sum liðið kann taka læruna av, soleiðis at somu mistøk ikki verða framd einaferð afturat. Megna teir tað, so er einki at ivast í, at KÍF eisini fer at teljast millum tey sterkaru liðini í endaspælinum.

Dysturin í tølum

Kyndil-KÍF 24-24 (11-11)

Málskjúttar:
Kyndil: Jacob Jónsson 7, Finnur Hansson 5(1), Høgni Klein 5, Hans Áki Dal-Christiansen 5, Jónleif Sólsker 1, Heini Bendtsen 1
KÍF: Damir Oros 8(4), Rógvi Weihe 5, Petur Martin Poulsen 3, Mirko Milinkvic 2, Kristjan Madsen 2, Eddie Joensen 1, Vagnur Johannesen 1, Finn Heri Joensen 1, Jákup Dam 1
Brotskøst: Kyndil 2, KÍF 4
Útvísingar: Kyndil 3, KÍF 8
Diskvalifikatión: Kyndil 1 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr Tjaldur: Kári Hnsen & Trygvi Mortensen

Tjaldur-Neistin 17-22 (11-11):

Neistin fekk vend í

Eftir tveir ósigrar á rað fingu neistakvinnurnar aftur fult, tá tær í Runavík lótu Tjaldur sita eftir við ongum

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Har var eingin millumvegur, tá Neistin vitjaði í Runavíkini mikudagin. Eftir laku úrslitini seinastu vikurnar var liðið í ferð við at søkka niður um heiðursmerkjabiðlarnar á stigatalvuni. og skuldi skútan rættast uppaftur, so var alneyðugt við tveimum stigum.

Tjaldur hevur ikki staðið seg so væl higartil í kappingini. Seinasta dystin, sum liðið spældi, hómaðist tó ein glott, tá tær púrasta óvæntað vunnu útidystin á Kyndli, og nú liðið eisini hevði fingið nýggjan rumenskan málverja, var einki at ivast í, at eisini tær settu nøsina upp eftir tveimum stigum.

Fyri steðgin var tað eisini leingi so, at Tjaldur fylgdi við gestunum. Kanska vóru tað gestirnir, sum høvdu munin, men hinvegin var hesin ongan tíð stórur, og tá Tajldur so eisini fekk fýra av teimum seinastu fimm málunum, so stóð aftur á jøvnum.

Í seinna hálvleiki kom tó heiolt skjótt til sjóndar, at hóast royndirnar frá Tjaldri, so var tað Neistin, sum var hitt stinnara liðið. Alt fyri eitt løgdu tær sjáogv niður til mótstøðuna, og í mun til støðuan í fyrra hálvleiki, so hildu tær hesa ferð fast allan vegin. Eitt lítið skifti fekk heimaliðið minkað munin niður í tvey mál, men so glapp aftur hjá Neistanum, soleiðis at veruligur spenningur ongan tíð kom í.

Við sigrinum vann Neistin seg upp á annað plássið á stigatalvuni, har tær nú eru eitt stig frammanfyri VÍF, meðan Tjaldur framvegis er einsamalt í botninum við tveimum stigum.

Dysturin í tølum

Tjaldur-NEistin 17-22 (11-11)

Málskjúttar:
Tjaldur: Milica Ergic 7(3), Lenka Ribaric 5(1), Kristine Ellingsgaard 2, Oddvá Fossdalsá 2, Hansa Mikkelsen 1
Neistin: Simona Dziugyte 6(1), Liv Sørensen 5, Anna Clementsen 4, Rakul Augustinussen 2, Ása á Neystabø 2, Susan Brockie 1
Brotskøst: Tjaldur 6, Neistin 1
Útvísingar: Tjaldur 6, Neistin 1
Diskvalifikatión: Tjaldur 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen

Tjaldur-Neistin 25-30 (15-12):

Teir bláu halda kósini

Tjaldur helt Neistanum í ein hálvleik, men fyrstu løtna eftir steðgin setti gestirnir ferðina upp, so væntaði sigurin kom til høldar

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Besta mansliðið hjá Tjaldri hevur eftir sjey dystum framvegis fyrstu stigini á árinum til góðar. Mikukvøldið var Neistin á vitjan í Runavíkini, og tó at tað eina løtu tóktist, sum kundi heimaliðið fáa okkurt burturúr, so endaði alt sum vant við, at mótstøðumenninir fóru við øllum.

Nýttu bert eitt korter

Í fyrra hálvleiki var tað annars so, at tað fyri tað mesta var Tjaldur, sum var á odda. Neistin hevði hendan hálvan tíman sera til við at prógva, hví liðið í løtuni stríðeist um eitt pláss frammí í oddinum, og tó at teir onkuntíð skúmaðu seg upp, so vóru deyðu løturnar undan steðginum alt ov nógvar, til at nakað veruligt úrslit spurdist burturúr.

Seinastu minuttirnar undan steðginum stóð heilt stilt, soleiðis at Tjaldur fekk høvi til at fara til hálvleiks við eini trý mála leiðslu.

Eftir steðgin var tó skjótt greitt, at hetta ikki var ein støða, sum gestirnir uttan víðari ætlaðu sær at góðtaka. Ferðin varð alt fyri eitt sett uppeftir, og tá knapt korter var farið, var munurin komin upp í fimm mál. Og tó at hondbremsan eftir hetta aftur varð togað nakað uppeftir, so megnaði Tjaldur ikki veruliga at skapa nakran spenning í. Tað var sum heldur ikki væntandi, men avrikið mikukvøldið vísti tó, at hóast tað enn er nakað upp til sterkaru liðini í deildini, so kunnu heldur ikki hesi loyva sær av løttum. Og fæst venjingarstøðan so eisini í ta leguna, sum hon eigur at vera hjá einum liði í bestu deildini, so er ikki óhugsandi, at runavíkingarnir kortini fara at gera onkrar skreytir, sum árið líður.

Neistin hevur við sigrinum vunnið seg ájavnt VÍF á stigatalvuni. Tvey stig aftan fyri oddaliðið, StÍF. Júst vestmenningar eru mótstøðumenninir komandi vikuskiftið, og lítið er at ivast í, at skal úrslit spyrjast burtur úr teirri uppgerðini, so verður neyðugt at lyfta avrikið fleiri stig upp um tað, sum liðið sýndi hesaferð. Men um tað fer at eydnast, fæst so ikki at vita fyrr enn sunnudagin.

Dysturin í tølum

Tjaldur-Neistin 25-30 (15-12)

Málskjúttar:
Tjaldur: Soran Sarcevic 7(1), Dragisa Stojovic 6(2), Sverri Justinussen 4, Jens Martin Knudsen 3(1), Áki L. Hansen 3, Arnfinn Langgaard 1
Neistin: Áki Mørk 8(2), Ragnar Stakksund 5, Morgan Knezevic 5, Helgi Justinussen 4, Kári Mortensen 4, Ræni Slættanes 2, Dann Thorleivsson 2
Brotskøst: Tjaldur 5, Neistin 6
Útvísingar: Tjaldur 3, Neistin 2
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen

UTTAN ÚR HEIMI

Bush størri vandi fyri friðin enn Saddam Hussein

Triði hvør breti heldur, at amerikanski forsetin er ein størri hóttan ímóti heimsfriðinum enn irakski forsetin

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen

Ein meiningakanning í Bretlandi vísir, at 76 prosent av bretska fólkinum vænta, at tað verður neyðugt við einum hernaðarligum átaki ímóti Irak, men sama kanning vísir, at bara 13 prosent taka undir við einum tilíkum átaki. Hinvegin eru bara níggju prosent beinleiðis ímóti.

Av teimum nógvu, sum ivast, halda 49 prosent, at irakski forsetin, Saddam Hussein, er tann størsta hóttanin ímóti heimsfriðinum, meðan 32 prosent halda, at Bush er uppaftur størri hóttan ímóti heimsfriðinum enn Saddam Hussein.

Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, hevur alla tíðina tikið undir við amerikanska politikkinum mótvegis Irak, men í kanningini siga 46 prosent, at Blair gongur sum ein hundur aftan á harra sínum. 35 prosent halda tó, at Blair hevur eina sissandi ávirkan á Bush.

Frank Luntz, sum hevur gjørt meiningakanningina fyri sjónvarpsstøðina Channel 4 News, sigur, at kanningin boðar týðliga frá, at avgerðin hjá Tony Blair at stuðla Bush kann koma umdømi hansara í sjálvum Bretlandi aftur um brekku.

Týskarar ímóti

Í Týsklandi hevur Gerhard Schrøder, kanslari alla tíðina sagt, at Týskland fer ikki at senda hermenn til Irak at berjast saman við amerikanarunum, og nú vísir ein meiningakanning, at kanslarin fær dygga undirtøku í hesum máli.

Kanningin, sum vikublaðið Stern hevur gjørt, vísir, at 80 prosent av teimum spurdu eru ímóti, at týskir hermenn verða sendir til Irak, meðan 18 prosent halda, at Týskland eigur at taka lut í einum hernaðarátaki ímóti landinum.

Rikin úr kirkjuni

Umleið 100 flóttafólk, sum høvdu leitað sær skjól í einari kirkju í Calais í Fraklandi, vórðu í gjár rikin út við makt

FLÓTTAFÓLK
Árni Joensen

Um fimmtíðina gjáramorgunin fóru franskir løgreglumenn inn í Saint Pierre kirkjuna í Calais eftir 95 afghanskum og irakskum flóttafólkum. Flóttafólkini fóru inn í kirkjuna seinasta leygardag og sýttu fyri at fara haðani, fyrr enn tey fingu loyvi at sleppa til Bretlands. Nøkur teirra kravdu at sleppa í Sangatte-flóttafólkaleguna nærhendis Calais, men tí sýttu myndugleikarnir fyri, tí tað hevur víst seg, at nógv flóttafólk eru flýdd úr leguni og haðani ígjøgnum undirsjóvbartunnilin til Bretlands.

Eitt vælmannað løgreglulið flutti flóttafólkini úr kirkuni og upp í bussar, sum koyrdu tey til flóttafólkalegur

Áðrenn løgreglan tók seg inn í kirkjuna, høvdu nøkur av flóttafólkunum hótt við at taka lívið av sær, leyp løgreglan á, men alt fór kortini friðarliga fram. Tey 95 fólkini vórðu koyrd upp í bussar og flutt til flóttafólkalegur í Norður-Fraklandi.

Enn er ikki avgjørt, hvat fronsku myndugleikarnir fara at gera við flóttafólkini. Talsmenn hjá myndugleikunum hava tó sagt, at irakararnir verða neyvan sendir aftur til Irak, men síðani Talibanstýrið fall í Afghanistan, hevur Frakland sent fleiri afghansk flóttafólk heimaftur.

Kina fær nýggja leiðslu

Jiang Zemin, forseti er farin frá, og eftirmaður hansara verður uttan iva varaforsetin Hu Jintao

KINA
Árni Joensen

Tað var á landsfundinum hjá kommunistaflokkinum, at Jiang Zemin boðaði frá, at hann tók seg úr starvinum sum floksformaður, og at Hu Jintao tekur við. Skiftið fer uttan iva at hava við sær, at Hu Jintao eisini fer at taka við sum nýggjur kinesiskur forseti, tá Jiang Zemin fer frá næsta ár.

Saman við Jians Zemin fóru fimm av stuðlum hansara úr floksleiðsluni, og úr Beijing verður sagt, at Hu Jintao hevur longu valt fimm at sínum stuðlum í floksleiðsluna. Hvørjir teir eru, verður almannakunngjørt í dag.

Eygleiðarar í Bejing siga, at tann nýggja floksleiðslan fer uttan iva at halda somu uttanríkispolitisku kós sum tann fráfarna. Á landsfundinum hevur Jiang Zemin sagt, at Kina fer at halda fram við teimum marknaðarbúskaparligu tillagingunum, sum hesi seinastu árini hava givið landinum ógvuliga stóra framgongd í búskapinum.

Elprísurin hækkar

Tann drúgvi turkurin í summar trýstir nú elprísin upp í Danmark, Noregi og í Svoríki.

Danska blaðið Politiken skrivaði í gjár, at fyritøkur og húsarhald kunnu vænta sær stórar eykarokningar í vetur. Blaðið roknar við, at í meðal skal eitt vanligt húsarhald rinda millum 150 og 300 krónur eyka, men hækkingin fer serliga at raka partar av vinnulívinum meint.

Fáa onga olju

Amerikansku myndugleikarnir hava nú gjørt av at steðga allari oljusølu til Norðurkorea, eftir at landið hevur viðgingið, at tað hevur arbeitt við einari kjarnorkuvápnaætlan.

Amerikanska avgerðin er í samsvari við ein sáttmála, sum tey bæði londini gjørdu í 1994. Eftir honum skuldi Norðurkorea steðga øllum kjarnorkuvápnaverkætlanum, men fyri einum góðum mánað síðani varð avdúkað, at landið hevur ikki hildið hendan partin av sáttmálanum.

Norðurkorea fær eisini olju úr Suðurkorea, og har umhugsa myndugleikarnir eisini at steðga oljuflutninginum til grannalandið. Eygleiðarar siga, at tað kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri tað fátæka Norðurkorea, fær landið ikki nóg mikið av olju í vetur.

Bøndurnir fækka

Bøndurnir í Noregi gerast alt færri og færri, og serliga hetta seinasta árið er talið minkað nógv.

Eitt yvirlit hjá bóndafelagnum vísir, at bara hetta seinasta árið eru 3.800 bøndur givnir. Tað svarar til seks prosent ella tvær ferðir so nógv sum meðalminkingin seinastu sjey árini. Í hesum tíðarskeiðinum eru bøndurnir í Noregi vorðnir 13.100 færri í tali.

Tað er tó ikki vist, at bøndurnir eru so fáir, sum hagtølini vísa. Útrokningin er gjørd eftir, hvussu nógvir bøndur hava søkt tað almenna um framleiðslustuðul í ár, men av tí at reglurnar eru broyttar, kann væl vera, at talið hóast alt er størri, enn tølini benda á. Í fjør søktu meiri 62.000 bøndur um framleiðslustuðul, men í ár hava myndugleikarnir fingið góðar 58.000 umsóknir.

Tað er kortini ein sannroynd, at færri og færri norðmenn tíma at fáast við landbúnað, og afturgongdin er størst í Hordalandi.

Skal hitta Bush

Hóast hann fleiri ferðir hevur funnist at amerikanska forsetanum, George W. Bush, hevur nývaldi forsetin í Brasil, Luiz Inacio da Silva, gjørt av at fara til Washington í næsta mánað at tosa við Bush.

Ein talsmaður hjá Lula, sum brasilski forsetin vanligi verður róptur, sigur, at samhandilin við USA er av avgerandi týdningi fyri brasilska búskapin, og tí er tað ikki annað enn rímiligt, at forsetin fer til Washington at vitja. Áðrenn hann fer til USA, skal Lula vitja Argentina og Chile.

USA hevur leingi roynt at skipa teir báðar amerikansku heimspartarnar sum eitt stórt fríhandilsøki, men hesum hevur Lula verið ímóti. Hann vil ikki knýta Brail tættari at USA enn neyðugt, men hevur harafturímóti mælt brasilska vinnulívinum til at økja samstarvið við ES.